ÚTVARP

LEYGARDAGUR

Leygarkvøldið kl. 19.05:

Nýggjar bøkur

Í hesari sendingini verða tey yrkingasøvnini, sum nýliga eru útkomin, umtalað, og lisið verður úr teimum. Vit skulu eisini hoyra brot úr ti, ið varð lisið upp í Norðurlandahúsinum fyri tveimum vikum síðani.

SUNNUDAGUR

Sunnudagin kl. 11.00:

Guðstænasta í Christianskirkjuni í Klaksvík

Elsa Funding, prestur, prædikar



Christianskirkjan í Klaksvík

Tann kirkjan, sum stóð í Klaksvík frammanundan hesari, varð vigd í 1866 og stóð á Gerðareiði. teir vita bert um eina kirkju at hava verið áðrenn ta tíð, hon stóð í Vági, og í Kommisionsbetænkningen 1709—10 kunnu vit lesa um hana: *»Vaags Kirke, lang 16½ Alen 3 Tommer, Koret deraf 4¾ Alen, høj 6 Alen, Mandsstole 11, og Kvindestole 10. Prædikestolen ved Kvindestolene, Alter med to Vinduer over, Skriftestol. Ornamenterne ere: Kalk og Disk af Kobber forgyldt, Messehagel af rødt Plys med Guldkniplinger paa Ryggen i Kryds, Messeskjorte og Alterdug forsvarlig, et Messing-Dobefad. Kirken indvendig klædt med Brædder og udvendig med Stenvæg omkring, tækket med Næver, et Træ-Taarn med to Klokker, Kirken overalt i god Hævd.*

Dens aarlige Indkomster er udi de allerbedste Aaringer 30 Gylden 13 Skind, og i de ringeste Aaringer 7 Gylden og 17 Skind. Dens ordinære visse aarlige Udgifter er 10 Gylden 6 Skind.«

So mikið um ta Klaksvíkar kirkju, sum til 1866 stóð í Vági. Í 1963 varð nýggj stásilig kirkja, Christianskirkjan, vigd í Klaksvík. Um útsjóndina uttan kunnu vit siga, at danski arkitekturin Peter Koch sum fyrimynd hevur havt Kirkjubømúrin og ta gomlu føroysku bygdakirkjuna. Og sera vøkur er kirkjan við 5 vindeygum á rað á hvørjari síðu, sum ganga heilt frá grundini og upp í takið, har tey enda við einum kvisti. Endaveggirnir eru laðaðir av føroyskum grótsteinum — størri ogsmærri steinum í ymiskum skapi og ymiskt littir, eru sera væleydnaðir og halda sína egnu prædiku, og tá serliga ta runda vindeyga við mosaikrútunum og krossurin í vesturskjøldrinum.

Sunnudagin sendir útvarpið guðstænastu úr Christianskirkjuni. Elsa Funding, prestur, prædikar.

Sunnudagin kl. 13.40:

»Jólaklokkan aftur ringir«

Advent í Sandavágs kirkju



Sandavágs kirkja

Í 1917 fekk ein føroysk bygd nýggja, stásiliga kirkju. Tað var gamla løgmansbygdin Sandavágur. Hann, sum stíladi fyri tekning og bygging, var havnarmaðurin Magnus á Kamarinum, og sigast má, at henda kirkja er eitt veruligt minni um henda merkismann.

Í Sandavági er góður kirkjusangur, og hetta man fyri ein part koma av, at bygdin hevur verið og framvegis er væl fyri við organistum, og tað litla Frobenius-orglið frá 1917 hevur verið sanginum ein góður stuðul.

Tann síðsta sunnudagssendingin við adventssangi á hesum sinni í Útvarpinum kemur úr Sandavági. Tey syngja fýra sálmar: »Jólaklokkan aftur ringir« við lag eftir Hans Jacob Højgaard og orðum eftir Jakob Jakobsen, tveir sálmar, sum hava orð og løg eftir Jógvan Nolsøe, »Himnafaðir, tinir einglar flúgva« og »Ring nú, kirkjuklokka, inn«, og at enda »Stuttligt er um jólatræ« við orðum eftir Djóna í Geil.

Sunnudagin kl. 17.00:

Tvey ættarlið spæla tónleik

Steintór Rasmussen prátar við Herluf og Torbjørn Sørensen, sum báðir hava stóran áhuga fyri tónleiki. Teir fara eisini at velja nøkur løg.

ÚTVARPS-SKRÁIN

Leygardagur 19.

07.40 **Jólakalendarin**
08.55 **Jólakalendarin**
09.30 **Barnaútvarpið**
11.01 **Dansarinnan** — 4. partur
13.01 **Vikanið fer**
14.00 **Ungdómssending**
18.40 **Barnaútvarpið**
19.00 **V4-dráttur**
19.05 **Nýggjar bøkur** — Sigmund Poulsen leggur til rættis
20.00 **Dagsins poppur**
21.00 **Dansitónar úr Gundadali**
21.50 **Hetta heilaga evangeliið skrivar**

Sunnudagur 20.

09.30 **Barnaútvarpið**
11.01 **Fiskivinnutátturin**
17.00 **Nýggjar bøkur**
18.00 **Barnaútvarpið**
19.00 **Fiskivinnutátturin**
19.30 **Stjørnuløg**
20.00 **Dansarinnan** — 5. partur
20.30 **Rockredaksjónin**
21.10 **Advents- og jólasálmar** — »Hjarta, frø teg, ver ei bangið

Týsdagur 22.

09.30 **Barnaútvarpið**
11.01 **Dansarinnan** — 5. partur
12.55 **Føroyski skipalistin**
16.05 **Ungdómssending**
18.00 **Barnaútvarpið**
19.00 **Lív og likindi**
19.30 **Úr plátusavninum**
20.00 **Talvtímin**

Mikudagur 23.

07.35 **Jólakalendarin**
08.55 **Jólakalendarin**
09.15 **Barnaútvarpið**
09.30 **Lív og likindi**
11.01 **Kvøðuljómar til sjófólkið**
17.00 **Hebridurnar** — tónleikasending, sum Martin Mouritsen leggur til rættis
18.00 **Barnaútvarpið**
19.00 **Jólaheilsur úr útlondum**
22.00 **Veðurtíðindi**

SJÓNVARPS-SKRÁIN

Leygardagur 19.

13.50 **Chart Attack**
15.00 **Ítróttur**
18.00 **Dollars**
18.50 **Okkara heimur 8 (8)**
19.20 **Matgerð í ymsum londum: Danmark**
19.35 **Cosby og tey**
20.00 **Grannar okkara**
20.30 **Heimur í 30-árunum** — 4
20.55 **Independance** — am. western
22.30 **Sig ikki nei ...** (svenskt undirhald)
23.30 **Soap**
23.55 **Liðugt**

Týsdagur 22.

19.20 **Tíðindi fyri deyv**
19.30 **Jólaløtan**
20.00 **Dagur og vika**
20.30 **Samrøða við Petur á Regni**
21.10 **Tey óynsktu børnini** — am. filmur
22.45 **Vladimir Majakovskij**
23.45 **Liðugt**

Jólaaftan

14.00 **Jólaløtan**
17.30 **Steðgur**
20.45 **Harvey** — am. filmur
22.45 **Jólaljómi úr Hellinum**
22.55 **Miðnáttarmessa úr Peturskirkjuni í Rom**
0.30 **Liðugt**

Sunnudagur 20.

14.00 **Gluggin** (e)
14.40 **Helen Keller** — an filmur
16.20 **Brøðurnir**
17.25 **Á sýnini** (e)
18.30 **Jólamaðurin, sum hann er**
19.30 **Jólaløtan**
20.15 **Gluggin**
21.00 **Skapa tær**
21.30 **Í aradis í morgin** — 5 (11)
22.25 **Andakt**
22.30 **Burtur úr myrkrinum**
23.00 **Halleluja**
23.55 Liðugt

KJARTAN DALSGAARD
TRYGGINGAR
UMBOÐS
STOVA
HOYDALSVEGUR 6
TLF 1 5222

– har flestu tryggingar kunnu teknast

Avgreiðslutíðir:
9—12 og 13—16

MORGUN-lestrarnir

21.—31. desember 1987

Niklái Poulsen í Árnafirði lesur
Sálmar og bíbliuorð:

Mánadagur 21. desember
nr. 65 Í Betlehem á nátt eitt fjós
Opinb. 5,5
nr. 68 Gleðin hon er fødd í dag

Týsdagur 22. desember
nr. 72 Hin vænasta rósan er funnin
Luk. 2,7
nr. 57 Av himni kom ein einglaherur

Tollaksmessudagur 23. desember
nr. 62 Gleðilig jól
Luk. 2,11
nr. 58 Tað sótu seyðamenn á vakt

Jólaaftan 24. desember
nr. 53 Eitt barn er føtt í Betlehem
Luk. 2,12—14

Mánadagur 28. desember
nr. 71 Heilaga stund
Luk. 2,29 & 30
nr. 385 O, Jesus mín, við tína lið

Týsdagur 29. desember
nr. 394 Eg ungur var og fattur við
Luk. 2,34
nr. 75 Tú stjørna blonk á himni hátt

Mikudagur 30. desember
nr. 336 Hvat boðar nýárs signað sól
1. Mós. 48,9
nr. 332 Hitt gamla ár er runnið

Nýggjársaftan 31. desember
nr. 340 Tíðin rennur sum streymur í á
Sálm. 90,9 og 102,28
nr. 329 Árið líður skjótt at enda